Almannamálaráðið

# JAVNSTØÐU-POLITIKKUR

– tí tað loysir seg



Virkisætlan

# INNIHALDSYVIRLIT

Inngangur til virkisætlan . . . 4
Samanumtøka: Fokusøki og átøk . . . 6
Økt tilvitan um kyn og javnstøðu í samfelagnum . . . 10
Átøk á dagstovnum og í skúlum . . . 10
Upplýsandi tilfar í almenna rúminum . . . 14
Politisk luttøka hjá kvinnum . . . 14
Kvinnur og menn í fjølmiðlunum . . . 15
Javnstøða í arbeiðslívinum . . . 16
Javnstøða og útbúgving . . . 18
Kynbýtt útbúgvingarskipan . . . 18
STEM . . . 21
Møguleikin at sameina familjulív og arbeiðslív . . . 21
Kvinnur arbeiða niðursetta tíð . . . 24
Minka munin á pensjónsuppsparing millum kynini. . . . 24
Útlendskar kvinnur í Føroyum . . . 25
Javnstøðupolitikkur á arbeiðsplássum . . . 25
Menn og javnstøða. . . . 28
Pápar í barnsburðarfarloyvi . . . 28
Ræturin hjá pápum at taka størri lut í lívinum hjá smábørnum. . . 30
Menn og heilsa . . . 30
Barbershop . . . 31
Harðskapur og haturstala . . . 32
Haturstala . . . 33
Hagtøl um harðskap móti kvinnum . . . 34
Lóggáva og altjóða sáttmáli . . . 36
CEDAW-sáttmálin. . . . 36
Javnstøðulógin. . . . 39
Skrivstova til javnstøðumál . . . 40
Kynsamtáttan . . . 40
Javnstøðufrágreiðing . . . 41
Fylgiskjal 1 . . . 42
Fylgiskjal 2 . . . 44
Keldulisti . . . 46

**Almannamálaráðið, várið 2018**

**Snið og framleiðsla:** Sendistovan

**Myndir:** Bjartur Vest, Sev, Landsverk,
Føroya landsstýri og Fotostudio



**EYÐGUNN SAMUELSEN**
*landsstýriskvinna í javnstøðumálum*

# Inngangur til virkisætlan

Henda virkisætlanin byggir á: „Javnstøðupolitikkur – tí tað loysir seg", og politikkurin eigur at verða lisin, áðrenn farið verður undir at lesa virkisætlanina.

Sum víst varð á í Javnstøðupolitikkinum, eru fleiri avbjóðingar á javnstøðuøkinum, og hesum ynskir landsstýriskvinnan at arbeiða við.

Ein av størstu avbjóðingunum er stóri ójavnin á útgoldnum lønum til kvinnur og menn, og at lønargjógvin millum kynini bara tykist at vaksa. Kvinnur hava framvegis nógvar tímar av óløntum arbeiði, og munur er á hvussu nógvar tímar kvinnur brúka til ólønt arbeiði í mun til menn. Onnur hvør kvinna arbeiðir niðursetta tíð, og fimta hvør av hesum sleppur ikki upp í tíð, hóast hon ynskir tað. Kvinnur hava lægri eftirlønaruppsparingar. Pápar taka einans 7% av barnsburðarfarloyvinum, og hetta er nógv lægst í Norðurlondum.

Javnstøðuøkið er sera umfatandi, og tí hevur landsstýriskvinnan Eyðgunn Samuelsen raðfest fimm fokusøki:

- **Økt tilvitan um kyn og javnstøðu**
- **Javnstøða í arbeiðslívinum**
- **Menn og javnstøða**
- **Harðskapur og haturstala**
- **Lóggáva og altjóða sáttmáli**

Virkisætlanin lýsir tey fimm fokusøkini og tær fordingar, sum eru fyri javnstøðu. Til hvørt fokusøki er ein røð av ítøkiligum átøkum, sum skulu virka fyri at smalka gjónna millum kynini.

Landsstýriskvinnan hevur arbeitt saman við avvarðandi landsstýrisfólkum, stjórnarráðum, stovnum, felagsskapum og øðrum at gera átøk innan tey ymsu fokusøkini.

Tilsamans eru orðað 27 ymisk átøk, sum myndugleikar og stovnar fara at seta í verk komandi fimm árini. Átøkini verða lýst í stuttum, ábyrgdari og samstarvspartnarar eru sett á, umframt at tíðarætlan er fyri, nær átakið verður framt. Nøkur átøk eru rættiliga ítøkilig, og til ber at fara undir hesi alt fyri eitt. Onnur krevja, at partarnir arbeiða saman um, hvussu hesi átøkini kunnu skipast.

Samanumtøka:

# Fokusøki og átøk

## Fokusøki 1: Økt tilvitan um kyn og javnstøðu

| Átøk | Ábyrgdari | Samstarvspartar | Tíðarætlan |
|---|---|---|---|
| **Átak 1**: Økja tilvitan um kynleiklutir og javnstøðu í dagstovnum | Javnstøðunevndin | | 2021–2022 |
| **Átak 2**: Tilvitan um kynleiklutir í námsskipanum á námsfrøði- og læraraútbúgvingunum | Javnstøðunevndin | Mentamálaráðið, Fróðskaparsetrið | 2020–2021 |
| **Átak 3**: Økja tilvitan um javnstøðu hjá børnum í skúlaaldri | Mentamálaráðið | Nám | Í gongd |
| **Átak 4**: Økja tilvitan um javnstøðu hjá næmingum á miðnámi | Mentamálaráðið | | 2018–2022 |
| **Átak 5**: Upplýsandi tilfar í almenna rúminum | Javnstøðunevndin | Føroya Arbeiðsgevarafelag | 2019–2020 |
| **Átak 6**: Kvinnur í politikki | Demokratia | | Í gongd |
| **Átak 7**: Javnstøða í Public service sáttmálan við Kvf | Mentamálaráðið | Kringvarp Føroya | 2020–2021 |



## Fokusøki 2: Javnstøða í arbeiðslívinum

| Átøk | Ábyrgdari | Samstarvspartar | Tíðarætlan |
|---|---|---|---|
| **Átak 8**: Forða fyri at dreingir detta út úr útbúgvingarskipanini uttan útbúgving | Mentamálaráðið | Fólkaheilsuráðið | 2019-2022 |
| **Átak 9:** Eggja øðrum kyninum til at taka ávísar útbúgvingar | Javnstøðunevndin | Mentamálaráðið, Fróðskaparsetrið | 2019-2020 |
| **Átak 10**: Eggja fleiri gentum at taka STEM fak | Javnstøðunevndin | Mentamálaráðið, skúlaleiðslur, lærarar, yrkisskúlar, vegleiðarar, Fróðskaparsetrið | 2021-2022 |
| **Átak 11**: Kunning um parttíðarstørv í Føroyum | Javnstøðunevndin | | 2018 |
| **Átak 12**: Økja møguleikan fyri at arbeiða fulla tíð | Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum | Heilsuverkið, Kommunufelagið, fakfeløg | 2018-2020 |
| **Átak 13**: Kanning av muninum millum pensjónsuppsparing hjá kvinnum og monnum | Almannamálaráðið | Granskingarráðið, Pensjónsfeløg, fakfeløg | 2018-2020 |
| **Átak 14**: Kunningartiltak – javnstøða viðvíkjandi pensjónsviðurskiftum | Almannamálaráðið | | 2020 |
| **Átak 15**: Kanna støðuna hjá útlendskum kvinnum og gera neyðug átøk | Almannamálaráðið | Útlendingastovan | 2018-2022 |
| **Átak 16**: Javnstøðupolitikkur á arbeiðsplássum | Almannamálaráðið | Javnstøðunevndin, Føroya Arbeiðsgevarafelag | 2018-2020 |

## Fokusøki 3: Menn og javnstøða

| Átøk | Ábyrgdari | Samstarvspartar | Tíðarætlan |
|---|---|---|---|
| **Átak 17**: Pápar longri í barsilsfarloyvi | Samferðslu-málaráðið | Lønardeildin, Føroya Arbeiðsgevarafelag, fakfeløg | 2018–2022 |
| **Átak 18**: Betri foreldrarættindi | Heilsu- og innlendismálaráðið | | Eftir 29. juli 2018 |
| **Átak 19**: Kunningarátøk – Hvat feilar tær, maður? | Fólkaheilsuráðið | | 2019-2021 |
| **Átak 20**: Barbershop | Almannamálaráðið | Javnstøðunevndin, ísl. Uttanríkismálar. og Vælferðarmálar. Fólkaheilsuráðið | Á heysti 2019 |

## Fokusøki 4: Harðskapur og haturstala

| Átøk | Ábyrgdari | Samstarvspartar | Tíðarætlan |
|---|---|---|---|
| **Átak 21**: Kunningarátak – Haturstala | Sig frá! | Fólkaheilsuráðið | 2018-2020 |
| **Átak 22**: Útvega hagtøl um harðskap móti kvinnum | Sig frá! | | 2018-2019 |

## Fokusøki 5: Lóggáva og altjóða sáttmáli

| Átøk | Ábyrgdari | Samstarvspartar | Tíðarætlan |
|---|---|---|---|
| **Átak 23**: Almenn kunning um Kvinnurættindasáttmálan | Almannamálaráðið | Mentamálaráðið, Amnesty International | 2018-2019 |
| **Átak 24**: Leggja kærumál hjá Javnstøðunevndini til kærunevnd | Almannamálaráðið | | 2018 |
| **Átak 25**: Seta á stovn skrivstovu at taka sær av m.ø. javnstøðumálum | Almannamálaráðið | | 2018-2019 |
| **Átak 26**: Kynsamtáttan | Løgmansskrivstovan | Javnstøðunevndin | 2018-2020 |
| **Átak 27**: Javnstøðufrágreiðing | Almannamálaráðið | Javnstøðunevndin, Hagstovan | 2018-2020 |





Fokusøki 1:

# Økt tilvitan um kyn og javnstøðu í samfelagnum

Javnstøða snýr seg um, at kvinnur og menn, gentur og dreingir skulu hava somu møguleikar, rættindi og skyldur í samfelagnum, á jøvnum føti, og at munur ikki verður gjørdur vegna kyn. Javnstøða og javnrættindi eru ein fyritreyt fyri fólkaræði og hartil eisini ein fyritreyt í einum vælvirkandi, modernaðum vælferðarsamfelagi, har øll eru vinnarar.

Sjálvt hugtakið javnstøða elvir ofta til misskiljingar – og verður ofta blandað saman við javnleika ella tað at vera einsháttað – hóast javnstøða í rættari tulking júst merkir tað øvuta. Javnstøða er rætturin at vera ymisk, óheft av samfelagsnormum og væntanum tengdar at okkara kyni. Tað er sostatt á ongan hátt talan um at taka nakað frá nøkrum, men eitt íkast til breiðari og fleiri ágóðar. Mótstøðan ímóti javnstøðu, sum onkuntíð sæst í føroyska samfelagnum, er tengd at misskiljing av sjálvum heitinum og endamálinum, og tí verður mett, at tað er av stórum týdningi at arbeiða við at økja um tilvitanina, bæði hjá almenninginum, men eisini myndugleikum.

## Átøk á dagstovnum og í skúlum

Gentur og dreingir skulu ikki vera eins, men tey skulu hava somu møguleikar at menna síni evni, sama hvat kynið er. Og tað hevur stóran týdning, hvat verður lagt niður í børn og ung. Tað hevur ikki bara týdning fyri lívið í løtuni, men eisini fyri tær útbúgvingar, størv og tað familjulív, sum tey fáa sær í framtíðini. Skulu vit broyta nakað, tá ið ein tíð er liðin, má javnstøðuarbeiðið byrja millum børnini og tey ungu.

Longu tíðliga í lívinum møta gentur og dreingir vaksnum, sum hava ávísar væntanir til, hvussu tey skulu bera seg at, sum ávikavist ein rættur drongur ella ein røtt genta, og so líðandi verða tey sosialiserað inn í kynleiklutirnar. Hetta hevur avgerandi týdning í mun til, hvørji val tey gera seinni í lívinum, t.d. viðvíkjandi útbúgving, starvi og familjulívi. Kynleiklutirnir kunnu avmarka teirra møguleikar at menna síni evni og áhugamál. Bæði á dagstovnum, í skúlum og í samfelagnum annars kunnu børn uppliva, at ymiskt virksemi er ætlað øðrum kyninum, og tí kann vera trupult at bróta tey sosialu mynstrini.

Seinastu áratíggjuni eru tó stórar broytingar hendar í kynleiklutamynstrinum, og formliga eru menn og kvinnur javnsett. Men framvegis er neyðugt at varpa ljós á, at tað einstaka barnið skal kunna menna seg út frá egnum fortreytum, og ikki út frá, um tey eru genta ella drongur.

## Javnstøðulógin um frálærutilfar

Sambært § 7 í javnstøðulógini skal frálærutilfar og uppaling barna samsvara javnstøðu-hugsjónini um, at munur ikki skal gerast á fólki vegna kyn. Mangt verður grundað tíðliga í uppvøkstrinum, eisini fatanir av kynleiklutum, og tískil hevur tað stóran týdning, at starvsfólk, ið eru um børnini, eru tilvitað um, hvussu tey eru við til at mynda børnini.

Vit kunnu og skulu ikki lóggeva okkum burtur úr avmarkandi kynleiklutum, men vit eiga at umrøða, hvussu vit í felag kunnu skapa størri frælsi. Vit eiga at arbeiða fyri, at fakfólk og onnur, sum eru um børn og ung, eru tilvitað um kyn og um hvørjar ótilvitaðar væntanir, ið vit kunnu hava til børn, orsakað av okkara siðbundnu fatanum av kynleiklutum. Starvsfólk eiga at vera tilvitað um at stimbra og stuðla børnum at styrkja síni áhugamál og menna síni evni, uttan mun til kyn.

## Námsfrøðiliga stevnumiðið fyri dagstovnar

Í „Námsfrøðilig stevnumið fyri dagstovnar", sum landsstýriskvinnan í mentamálum, Rigmor Dam, og Mentamálaráðið góvu út í 2016, stendur á s. 11:

„Dagstovnurin skal byggja sítt virksemi á sjónarmiðið um javnstøðu millum kynini. Javnstøða millum kynini skal endurspegla tað pedagogiska arbeiðið í dagstovninum. Dagstovnurin skal stuðla børnunum at møta og skapa

javnstøðu í samfelagnum. Gentur og dreingir eiga at hava sama møguleika at vera sædd og hoyrd og at verða eggjað til luttøku í felagsskapinum í øllum virksemi í dagstovninum.

Neyðugt er, at starvsfólkini umhugsa sín egna hugburð til gentur og dreingir og hugburðin, sum er frammi í samfelagnum, so kynið ikki verður ein avmarking í teimum møguleikum og avbjóðingum, sum børnini fáa."[1]

## Dagstovnaráð

Sambært fylgiskjalinum til samgonguskjalið, „Mál at fremja", vil samgongan: „menna dagstovnaøkið og geva tí uppiborna rúmd og tign við tí endamáli, at meira tíð verður til námsfrøðiligt virksemi, at skapa trivnað og málsliga menning. Dagstovnaráðið skal fáast at virka."[2]

Landsstýriskvinnan í mentamálum fer í næstum at leggja uppskot fyri løgtingið, har dagstovnaráð verður sett á stovn. Javnstøðunevndin fær umboðan í dagstovnaráðnum til tess at tryggja, at omanfyri nevnda áseting í námsfrøðiliga stevnumiðinum verður rokkin.

## Tilfar til íblástur

Javnstøðunevndin tók í 2016 stig til at umseta ein faldara, „Barnagarðar við plássi fyri Pippiprinsum og sjórænaraprinsessum," sum er ætlaður starvsfólki á dagstovnum. Faldarin kann geva starvsfólkum á dagstovnum íblástur til at arbeiða við kyni og javnstøðu. Javnstøðunevndin skipar fyri ókeypis skeiðum fyri starvsfólkum í øllum vøggustovum, barnagørðum og fyri dagrøktarpedagogum kring landið at arbeiða við kyni og javnstøðu. Javnstøðunevndin hevur vitjað flestallar dagstovnar fyri kortum, men ætlanin er at skipa fyri skeiðum aftur um nøkur ár.

### **Átak 1:** Økja tilvitan um kynleiklutir og javnstøðu í dagstovnum

Átak 1 snýr seg um at skipa fyri skeiðum og tiltøkum á dagstovnum til tess at gera tey meira tilvitað um kynleiklutir og javnstøðu millum børn.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2021-2022** |
| Ábyrgdari | **Javnstøðunevndin** |



1 *Námsfrøðilig stevnumið fyri dagstovnar, Mentamálaráðið, 2016*

2 *Fylgiskjal til samgonguskjalið, https://d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net/media/6803/fylgiskjal-mal-at-fremja-kvf.pdf*



### **Átak 2:** Tilvitan um kynleiklutir í námsskipanum á námsfrøði- og læraraútbúgvingunum

Átak 2 snýr seg um at áseta í námsskipanina fyri námsfrøði- og læraraútbúgvingarnar á Fróðskaparsetrinum undirvísing í kynfrøði, til tess at lærarar og námsfrøðingar gerast tilvitað um kynleiklutir í framtíðar starvi sínum, og soleiðis at henda tilvitanin er við í allari námsfrøði- og skúlaskipanini. Dagstovnar og skúlar kunnu eitt nú skipa fyri tiltøkum fyri foreldrum, ið snúgva seg um kyn.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2020-2021** |
| Ábyrgdari | **Javnstøðunevndin** |
| Samstarvspartnari | **Mentamálaráðið og Fróðskaparsetrið** |

## Undirvísingartilfar í fólkaskúlanum

Í endamálsorðingini í fólkaskúlalógini stendur millum annað í § 1., stk. 3: „... Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði."[3]

Tað eru ikki nógvar kanningar, sum vísa, um fólkaskúlin livir upp til hesa áseting. Tó læt Javnstøðunevndin í 2010 eina kanning gera, sum viðgjørdi kynleiklutir í føroyskum lesibókum í 1.-3. flokki.

Niðurstøðan var millum annað, at lítið fjølbroytni sæst í kynleiklutunum hjá gentum og kvinnum. Tær hava fingið tillutaðar munandi færri leiklutir enn dreingir og menn. Hjá dreingjum og monnum er munandi størri fjølbroytni, og teir hava fleiri leiklutir. Siðbundnar fatanir av kynleiklutunum eru ráðandi í tekstunum. Gentur og kenslur hoyra saman, og dreingir og virkisfýsni hoyra saman. Lesibókarøðin, sum byrjar í umleið 2000, telur tríggjar bøkur til ávikavist til 1., 2., og 3. flokk. Meðan bókin til 1. flokk leggur dent á javnt virði, eru søgurnar meira siðbundnar í bókunum til 2. og 3. flokk, við ótíðarhóskandi og stereotýpum í siðbundnum kynleiklutum.[4]

Skal nakað gerast fyri at broyta siðbundnu fatanina av ymisku leiklutunum hjá kvinnum og monnum, er umráðandi at framleiða undirvísingartilfar til fólkaskúlan, sum setur spurnartekn við siðbundnu fatanina av leiklutunum hjá kvinnum og monnum, gentum og dreingjum. Samstundis eigur tilfar, sum verður framleitt til fólkaskúlan, ikki at vera við til at sementera siðbundnu fatanina av kynleiklutunum.

Tað er eisini umráðandi at hyggja eftir útbúgvingarvali hjá gentum og dreingjum. Hvørjir faktorar gera seg galdandi, tá tey velja, sum tey gera. Eru tilfar, undirvísing og vegleiðing ávirkað av væntanum til, hvat *rættir* dreingir og *rættar* gentur eiga at hava áhuga fyri? Børnini eiga at kenna, at tað eru ikki kynmørk fyri, hvat tey velja í sambandi við yrkisleið ella útbúgving.

Mentamálaráðið hevur givið Námi boð um at taka atlit at javnstøðu, tá ið undirvísingartilfar verður endurnýggjað, og tá ið nýtt tilfar verður framleitt. Landsstýriskvinnan hevur heitt á Nám um at gera ein javnstøðupolitikk í sambandi við virksemi teirra.

### **Átak 3:** Økja tilvitan um javnstøðu hjá børnum í skúlaaldri

Átak 3 snýr seg um at tryggja, at alt undirvísingartilfar, sum verður framleitt, er í samsvari við ásetingina í fólkaskúlalógini. Eisini snýr átakið seg um at geva lærarum og vegleiðarum í fólkaskúlanum frálæru í, hvussu teir undirvísa og vegleiða uttan at leggja væntanir um kynleiklutir í børn. Mentamálaráðið og Nám eru longu farin undir hetta arbeiðið.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **Í gongd** |
| Ábyrgdari | **Mentamálaráðið** |
| Samstarvspartnari | **Nám** |

## Økja tilvitan um javnstøðu hjá næmingum á miðnámi

Í stevnumiðnum fyri gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar stendur í § 1., stk. 4. : „Næmingurin skal ogna sær førleika at taka virknan lut í einum fólkaræðisligum samfelag, ið byggir á andsfrælsi, tolsemi og javnrættindi, og at taka á seg ábyrgd og skyldur í hesum høpi."[5]

Samfelagsfrøði er kravd lærugrein á miðnámi, og eigur tað í námsætlanini at verða ásett, at næmingar skulu fáa frálæru í kynfrøði og viðgera javnstøðuspurningar. Eitt nú kann nevnast, at Javnstøðunevndin, í samstarvi við Nám, í januar 2015 gav út eina samvirkna bók: „Tvey kyn - ymsar støður". Bókin viðgerð ymsar javnstøðuspurningar og er ætlað til undirvísing í samfelagsfrøði á miðnámi, men kann eisini brúkast til eldru flokkarnar í fólkaskúlanum. Tað merkir, at føroyskt tilfar er tøkt at brúka í undirvísingini.

3 *Løgtingslóg um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011*

4 *Jacobsen, M. „Kynsleiklutir í føroyskum lesibókum 1.-3. flokk", Javnstøðunevndin 2010*

5 *Løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 140 frá 18. desember 2015*

### Átak 4: Økja tilvitan um javnstøðu hjá næmingum á miðnámi

Átak 4 snýr seg um at gera eina ætlan fyri, hvussu kynfrøði og javnstøða kunnu gerast partur av námsætlanunum á útbúgvingunum á miðnámi. Eins og í fólkaskúlanum, eigur frálæra eisini at vera fyri lærarum og vegleiðarum um at hava javnstøðusjónarhornið við í undirvísingini og vegleiðingini, soleiðis at tað ikki er kynið, ið er avgerandi, tá næmingar velja sær útbúgving og lívsstarv.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2018-2022** |
| Ábyrgdari | **Mentamálaráðið** |

### Upplýsandi tilfar í almenna rúminum

Tá arbeitt verður við at økja um tilvitanina um javnstøðu og ráðandi kynleiklutir, er ofta neyðugt at spyrja, hvussu vit sum samfelag síggja kynleiklutirnar og gera greitt, um hetta er fremjandi ella forðandi fyri frælsið hjá tí einstaka og hjá samfelagnum sum heild.

Vit ynskja, at tað ikki skal vera kynið, sum er avgerandi, tá gentur og dreingir velja sær útbúgving ella yrkisleið. Eisini er týdningarmikið, at arbeiðsmarknaðurin ikki er ov kynbýttur. Vit vita, at tað ber væl til hjá kvinnum at vera í siðbundnum mannfólkastørvum, og monnum at vera í siðbundnum kvinnustørvum, men tað er ikki altíð so sjónligt í almenna rúminum.

### Átak 5: Upplýsandi tilfar í almenna rúminum

Átak 5 snýr seg um at gera upplýsingarátøk, sum vísa eina aðra mynd enn ta ráðandi í mun til siðbundin kvinnustørv og mannfólkastørv, til tess at eggja gentum og dreingjum at velja útbúgving og starv eftir áhuga og evnum, heldur enn eftir, hvat verður væntað av teimum.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2019-2020** |
| Ábyrgdari | **Javnstøðunevndin** |
| Samstarvspartnari | **Føroya Arbeiðsgevarafelag** |

### Politisk luttøka hjá kvinnum

Hóast stóra framgongd seinnu árini er málið framvegis at fáa fleiri kvinnur at vera virknar í lands- og kommunalpolitikki. Sigast kann, at tað er grundleggjandi fyri fólkaræðið, at kvinnur, sum eru helvtin av fólkinum, eisini eru við til at taka avgerðir í samfelagnum.

Demokratia, sum er nevnd, ið løgtingið setti eftir tilmæli frá Útnorðurráðnum í 1999 við játtan á fíggjarlógini at virka fyri at økja um kvinnuleiklutin í politikki, hevur seinastu árini skipað fyri eini røð av átøkum við tí endamáli, at kvinnur fáa størri leiklut í politiskum avgerðum. Hetta arbeiðið hevur heilt víst verið við til at seta sjóneykuna á spurningin um kvinnuluttøku í politikki. Talið av kvinnum, sum eru valdar í løgtingið, er vaksið frá 15% í 1998 til 30% í 2015, og fyri fyrstu ferð hava vit nú javnstøðu í landsstýrinum. Til seinasta kommunustýrisval vóru 34% av valdu kommunustýrislimunum kvinnur.

Men hóast batar eru at hóma, er neyðugt áhaldandi at hava fokus á hesa avbjóðingina, tí tað vísir seg, at tá hildið verður, at málið er rokkið, ella at væl stendur til, fella fólk í somu vanar aftur.

### Átak 6: Kvinnur í politikki

Átak 6 snýr seg um at fáa fleiri kvinnur í politikk, ið er átak sum Demokratia arbeiðir við.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **Í gongd** |
| Ábyrgdari | **Demokratia** |

### Kvinnur og menn í fjølmiðlunum

Fjølmiðlar eru mentanarberar, og hátturin menn og kvinnur eru - ella ikki eru - við í fjølmiðlamyndini, gevur okkum eina ótilvitaða mynd av virðum og normum í samfelagnum og hevur tí ein týðandi leiklut í mun til, hvussu vit fata kynleiklutir.

Tíðindaflutningurin er serliga týðandi í mun til, hvussu valdshugtakið er býtt í samfelagnum. Ein fesk norðurlendsk kanning frá 2017,[6] vísir á, at kvinnur eru undirumboðaðar í tíðindaflutninginum, bæði sum tíðindafólk og sum keldur til upplýsingar. Tá talan er um týðandi evni, er ójavnin uppaftur størri.

Í Føroyum er talið av kvinnuligum tíðindafólkum nógv vaksið seinnu árini, tó eru ikki eins nógvar kvinnur og menn í sendingum og í miðlum sum heimildarfólk, serliga tá týðandi samfelagsviðurskifti verða viðgjørd.

Tað er týdningarmikið við fyrimyndum, soleiðis at uppvaksandi ættarliðið fær eina fjølbroyttari fatan av samfelagnum. Og hesa fatan fáa tey millum annað gjøgnum miðlarnar, sum hava stóra ávirkan og tí stóra ábyrgd.

### Átak 7: Javnstøða í Public service sáttmálan við Kringvarp Føroya

Mentamálaráðið ger fjórða hvørt ár Public-service sáttmála við Kringvarp Føroya. Í hesum sáttmála stendur onki um, at Kringvarpið skal hava javnstøðu við í sínum arbeiði. Hetta fer Mentamálaráðið at taka við í komandi Public service sáttmála við Kringvarp Føroya.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2020-2021** |
| Ábyrgdari | **Mentamálaráðið** |
| Samstarvspartnari | **Kringvarp Føroya** |

*6 Women and Men in the News, Nordic Council of Ministers, 2017*



Fokusøki 2:

# Javnstøða í arbeiðslívinum

Javnstøða er ein fyritreyt fyri eins møguleikum og atgongd fyri øll at gera seg galdandi á arbeiðsmarknaðinum. Í grannalondum okkara eru kanningar gjørdar, sum vísa, at er javnstøða á arbeiðsmarknaðinum, verða kappingarevni og búskaparvøksturin í samfelagnum eisini styrkt.[7]

Sambært tølum hjá Hagstovuni eru føroyingar arbeiðsvirknasta fólk í Evropa.[8] Hagstovan hevur samanborið 34 evropeisk lond, og samanberingarnar vísa, at av øllum føroyingum millum 15 og 74 ár, eru íalt 85% á arbeiðsmarknaðinum. Talan er um bæði kvinnur og menn.

Hyggja vit at støðuni við javnstøðubrillum, sæst, at menninir eru meira virknir á arbeiðsmarknaðinum enn kvinnurnar, og hetta er ikki einans galdandi fyri føroyskar menn, men sama myndin sæst í øllum londunum. Av øllum føroyskum monnum í aldrinum 15 til 74 ár, eru 87% virknir á arbeiðsmarknaðinum. 83% av teimum føroysku kvinnunum eru á arbeiðsmarknaðinum. Sambært hesum tølum eru vit eitt samfelag við góðari javnstøðu.

Hagstovan skrivar, at tá býtt verður á kyn, er vinnutíttleikin javnt størstur hjá mannfólki í Føroyum og Íslandi við 87%. Hjá konufólki er vinnutíttleikin nógv størstur í Føroyum við 83%. Minsti munurin millum vinnutíttleikan hjá monnum og kvinnum er í Føroyum, ávikavist 87 og 83%. Fyri ES er tað ávikavist 70 og 59%.

Men hóast hetta, er framvegis stórur munur á, hvørji størv menn og kvinnur velja, og í fleiri vinnubólkum er so at siga einans annað kynið umboðað. Hyggja vit eftir arbeiðsmarknaðinum í Føroyum horisontalt (eftir vinnugreinum) er hann sera kynbýttur.

7 http://www.norden.org/da/nordisk-ministerraad/ministerraad/nordisk-ministerraad-for-ligestilling-mr-jaem/arrangementer/ligestilling-er-en-vigtig-oekonomisk-parameter

8 http://www.hagstova.fo/fo/tidindi/2017/06/vit-eru-tey-mest-arbeidsvirknu-i-europa






Nøkur yrki ella vinnugreinar hava stóra yvirvág av einum kyni. Dømi um hetta er starvsfólk á dagstovnum, har ein stórur meiriluti er kvinnur. Onnur dømi eru byggi- og fiskivinnan, har flestu starvsfólk eru menn.

Vit hava ikki nóg góð hagtøl ella gransking í Føroyum hesum viðvíkjandi, men um hugt verður at horisontala kynbýtinum í Danmark, vísir gransking, at fleiri enn 60% av fólkinum starvast innan vinnugreinar, har tað eru fleiri enn 80% av øðrum kyninum.[9] Orsakað av hesum kynbýtinum, eru nógv fólk, sum í stóran mun ikki starvast saman við fólki av hinum kyninum. Hetta hevur avleiðingar fyri, hvussu uppgávurnar verða loystar, menningina innan hesar vinnugreinar eins og hugburðin til, hvør ger hvat í samfelagnum. Kanningar vísa, at har kynbýtið er javnt, eru betri trivnaður og betri úrslit.[10]

Ein onnur avleiðing av einum kynbýttum arbeiðsmarknaði er, at arbeiðsmarknaðurin verður nógv minni smidligur. Um kvinnur og menn kenna seg ov bundin at ávísum sløgum av størvum, síggjast fleiri fløskuhálsar á arbeiðsmarknaðinum. Tað hevur við sær, at arbeiðsmarknaðurin ikki kann laga seg til nóg skjótt, tá fyritreytirnar broytast.[11]

Skal horisontala kynbýtið á arbeiðsmarknaðinum broytast, er hetta ein uppgáva, sum skal loysast bæði í útbúgvingarskipanini, á hægri lærustovnum og á arbeiðsmarknaðinum. Harafturat er tað umráðandi, at børn kenna á sær, at tey kunnu velja yrkisleið frá eini breiðari viftu av møguleikum, og ikki verða stýrd av eintáttaðum hugsunarhátti um, hvørja yrkisleið menn og kvinnur eiga ella ynskja at hava.

*9 Et kønsopdelt arbejdsmarked. Udviklingstræk, konsekvenser og forklaringer. 16:15. SFI, Det nationale forskningscenter for velfærd, 2016.*

*10 Arbejdsmiljø og Helbred i Danmark 2012-2020, Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø, 2014*

*11 Et kønsopdelt arbejdsmarked. Udviklingstræk, konsekvenser og forklaringer. 16:15. SFI, Det nationale forskningscenter for velfærd, 2016.*




## Javnstøða og útbúgving

Rákið seinnu árini vísir, at dreingir dragna afturúr, tá talan er um útbúgving, og at færri dreingir fara undir hægri lestur. Tað vísir seg, at støðan á útbúgvingarøkinum er ymisk fyri gentur og dreingir. Eftir fólkaskúlan halda munandi fleiri gentur áfram í útbúgvingarskipanini, meðan dreingir í størri mun falla frá.[12] Bæði á miðnámsútbúgvingum og á hægri útbúgvingum eru væl fleiri gentur enn dreingir.

Samstundis sum allar forsagnir vísa á, at í framtíðini verður alsamt meira brúk fyri útbúnari arbeiðsmegi, og eftirspurningurin eftir ófaklærdari arbeiðsmegi fer at minka, bendir alt á, at í framtíðini fara menn at vera munandi verri útbúnir enn kvinnur. Hetta er ein óheppin gongd, tí formaliserað vitan, útbúgving og førleikar eru avgerandi fyri, hvussu vit sum einstaklingar og samfelag fara at klára okkum í einum støðugt meira altjóðagjørdum heimi.

Donsk kanning frá 2011, „Hvor bliver drengene af?"[13] staðfestir, at trý ár eftir lokna miðnámsútbúgving eru 29% av gentunum og 37% av dreingjunum ikki farin undir víðari lesnað.

Sum samfelag hava vit ikki ráð at lata óbrúkt tilfeingi gleppa okkum av hondum.

### ❯ Átak 8: Forða fyri at dreingir detta út úr útbúgvingarskipanini uttan útbúgving

Átak 8 snýr seg um at forða fyri at dreingir detta út úr útbúgvingarskipanini uttan eina útbúgving. Hesi tiltøk kunnu fremjast á øllum stigum – frá dagstovnum til miðnám.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2019-2022** |
| Ábyrgdari | **Mentamálaráðið** |
| Samstarvspartnari | **Fólkaheilsuráðið** |

## Kynbýtt útbúgvingarskipan

Stórur munur er á, hvørjar framhaldsútbúgvingar gentur og dreingir velja. Ein stórur partur av útbúgvingunum hevur stóra yvirvág av øðrum kyninum. Nakrir heilt fáir dreingir hava valt at gerast sjúkrarøktarfrøðingar, og tað eru ikki nógvar gentur, sum velja at fara á Vinnuháskúlan fyri at gerast skipsførarar ella maskinmeistarar.

12 Strøm, H.P. og Poulsen, K.W. „Javnstøða - Tvey Kyn" 2015

13 Hutters, C. og Brown, R. „Hvor bliver drengen af?", Centrer for ungdomsforskning, 2011



Vit kunnu tí vænta, at kynbýtið, sum er á arbeiðsmarknaðinum í dag, fer at halda fram langt inn í framtíðina. Tá arbeiðsmarknaðurin er so kynbýttur, er væl hugsandi, at øll ikki brúka síni evni til fulnar, og at arbeiðsmarknaðurin verður óliðiligur.

Avleiðingin av kynbýttu útbúgvingskipanini er, at við at avmarka útboðið av hugsandi valmøguleikum, avmarka vit eisini møguleikarnar hjá einstaka menniskjanum, og harvið samfelagnum. Eitt avmarkað val kann vera undirskilt og ikki altíð so týðiligt. Hetta merkir, at tey ungu umvegis sosialiseringina læra, at ávís val ikki eru hóskandi í mun til tað normala mynstrið. Á henda hátt verður fatanin av veruligum valmøguleikum avmarkað til tað, sum hóskar til galdandi kynfatan. Avleiðingin er, at arbeiðsmarknaðurin framhaldandi verður kynbýttur, og at kynmentanin og kynleiklutirnir verða endurskaptir ella reproduseraðir.[14]

Vit hvørki kunnu, ella skulu, ráða fyri, hvørja útbúgving hvørt einstakt ungfólk skal taka, men vit kunnu gera karmarnar so góðar sum gjørligt fyri, at øll hava eitt frítt val. Fjølbroytni er ein grundtreyt fyri, at eitt og hvørt samfelag kann blóma, og tí eiga vit at royna at loysa upp fyri teimum týðiligu kynleiklutunum, so at øll sløg av fólki síggja ein møguleika fyri og eina orsøk til at búgva her. Aðrastaðni er hugsanin um javnstøðu ein partur av arbeiðinum at menna vælferð, trivnað og vøkstur, og soleiðis verður tað eisini í størri mun her í Føroyum.[15]

### ❯ Átak 9: Eggja øðrum kyninum til at taka ávísar útbúgvingar

Átak 9 snýr seg um at kanna, hvørt tað ber til á ein skynsaman hátt at eggja fleiri dreingjum til at taka útbúgvingar, har tað er yvirvág av gentum, og samstundis eggja gentum til at taka útbúgvingar, har yvirvág er av dreingjum til tess at fáa ein minni kynbýttan arbeiðsmarknað.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2019-2020** |
| Ábyrgdari | **Javnstøðunevndin** |
| Samstarvspartnari | **Mentamálaráðið, Fróðskaparsetrið** |

14 Hayfield, E., í samrøðu í bókini „Javnstøða – tvey kyn" 2015

15 Patursson, L., í samrøðu í bókini „Javnstøða – tvey kyn" 2015



## STEM

Kanningar vísa, at gentur ofta hava minni tiltrúgv til sín sjálvs, tá tað kemur til tey náttúruvísindaligu og tøkniligu yrkini. Hetta hevur avgerandi týdning fyri, hvørja útbúgving tær velja, og er hetta tí ein av orsøkunum til kynbýtta útbúgvingarvalið.[16] Samstundis vísa kanningar, at lærarar og foreldur hava størstan týdning, tá børn og ung velja útbúgving, og tí hevur tað týdning at gera átøk, sum venda sær til lærarar og foreldur.

Tað vísir seg, at lærarar hava ymiskar væntanir til, hvat *rættar* gentur og *rættir* dreingir hava áhuga fyri og duga væl; lærarar halda, at dreingir eru sterkast í teimum náttúruvísindaligu greinunum, meðan gentur eru stinnast innan málslig fak.[17] Genturnar vísa á, at ein av orsøkunum til, at tær ikki hava valt útbúgvingar innan náttúruvísindi, er, at lærararnir ikki eggjaðu teimum til at fara náttúruvísindaliga vegin. Sama er galdandi í mun til lestrarvegleiðingina, har serliga gentur siga seg ynskja betri vegleiðing innan STEM-fak. STEM er stytting fyri Science, Technology, Engineering and Mathematics – vísindi, tøkni, verkfrøði og støddfrøði.

Ikki allir lærarar, sum undirvísa í STEM fakum, hava hesi fak á linju, tá teir hava tikið læraraútbúgvingina.[18] Hetta er ein stór avbjóðing, og tað er neyðugt at leggja dent á at styrkja førleikarnar hjá lærarum innan hesi fakini, tí áhugin fyri náttúruvísindum kemur ikki av sær sjálvum – hvørki hjá gentum ella dreingjum.

## Átak 10: Eggja fleiri gentum at taka STEM fak

Átak 10 snýr seg um at fremja upplýsing, framleiða faldara, tosa við skúlaleiðslur og lærarar, børn og foreldur t.d. í 4., 5. og 6. flokki í fimm ár.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2021-2022** |
| Ábyrgdari | **Javnstøðunevndin** |
| Samstarvspartnari | **Mentamálaráðið, skúlaleiðslur, yrkisskúlar, vegleiðarar, Fróðskaparsetrið** |

## Møguleikin at sameina familjulív og arbeiðslív

Menninir í Føroyum forvinna lutfalsliga nærum dupult so nógv í lønum sum kvinnurnar. Í 2016 forvunnu menn 5,3 mia. kr. í lønum, og kvinnur forvunnu 3,2 mia. kr.[19] Tað merkir, at menn forvinna 62% av lønunum, og kvinnurnar 38%.

Tølini fevna bara um lønir, sum føroyskar fyritøkur rinda, so inntøkur frá útlendskum arbeiðsgevarum eru ikki við. Av tí at munandi fleiri menn enn kvinnur arbeiða uttanlands, er lønargjógvin millum kynini allarhelst munandi breiðari.[20]

16 Puggaard, K.M og Bækgaard, L. *„Håndbog om tiltrækning af piger til Science, Technology, Engineering and Mathematics (STEM)", Norden, 2016*

17 Puggaard, K.M og Bækgaard, L. *„Håndbog om tiltrækning af piger til Science, Technology, Engineering and Mathematics (STEM)", Norden, 2016*

18 *Skúlablaðið nr. 2/2017*

19 *Hagstovan*

20 *Kvinna, nr. 02/2017*



Tølini vísa tó bara eina síðu. Veruleikin er, at ein stórur partur av arbeiðinum als ikki verður løntur, og tískil heldur ikki skrásettur í tjóðarroknskapinum.

Kvinnur brúka í miðal 60% meira tíð enn menn til ólønt arbeiði heima við hús. Ójavna býtið er ein týðandi forðing fyri javnstøðu, fíggjarligum sjálvræði og búskaparligari menning, meta bæði OECD og ST.

Blaðið Kvinna gjørdi á vári 2017 eina kanning av, hvussu arbeiðsbýtið er millum kynini í Føroyum, og hendan kanningin vísir, at sama mynstur er galdandi her heima.[21] Ein norðurlendsk kanning, sum kannaði partíðararbeiði, vísti, at nógvar føroyskar kvinnur fara niður í tíð fyri at fáa stundir til ólønta arbeiðið heima.[22]

Kvinnur brúka í miðal 3 til 6 tímar til ólønt arbeiði um dagin, meðan menn brúka 1½ til 2 tímar. Ólønta arbeiðið skerjir møguleikarnar hjá kvinnuni at vera á arbeiðsmarknaðinum, tí fleiri tímar kvinnur brúka til ólønta arbeiðið, minni eru tær á arbeiðsmarknaðinum. Ójavna býtið í ólønta arbeiðinum ávirkar eisini lønarlagið hjá kvinnunum, eins og tað hevur neiliga ávirkan á pensjónsuppsparingina.

*21 Kvinna, nr. 02/2017*

*22 Part-Time Work in the Nordic Region III, TemaNord 2016:518*






Tað er umráðandi, at familjulívið samvirkar við arbeiðslívið, og at býtið av ólønta arbeiðinum er javnari millum kynini. Fleiri av uppgávunum, sum í dag eru óløntar, kunnu loysast av øðrum. Millum annað er umráðandi, at dagstovnar hava opið meira smidligt, at eldrarøktin virkar væl, og at bæði foreldur býtast um barnsburðarfarloyvið. Tí tíðin, sum fer til ólønta arbeiðið, hevur ávirkan á so nógv onnur viðurskifti, eitt nú møguleikarnar hjá kvinnunum at vera við, har avgerðir verða tiknar.

Kanningar vísa, at javnstøða er millum kynini, tá tað ræður um ólønta arbeiðið, til børnini koma. Tá hendir eitt skifti, tí kvinnurnar eru heima í barnsburðarfarloyvi í longri tíð – ofta upp í eitt ár – og yvirtaka tá høvuðsábyrgdina av heiminum, meðan maðurin í størri mun fær høvuðsábyrgdina av at forsyrgja familjuni. Hendan gjógvin gerst alsamt breiðari, jú longri tíð kvinnan er burtur frá arbeiðsmarknaðinum.

Skal hetta broytast, er tað avgerandi, at foreldur býta barnsburðarfarloyvið meira javnt. Hetta verður viðgjørt nærri undir Fokusøki 3.

## Kvinnur arbeiða niðursetta tíð

84,4% av kvinnunum í Føroyum arbeiða uttan fyri heimið, og hetta eru fleiri, enn í hinum Norðurlondunum.[23] Men samstundis arbeiða tær í stóran mun niðursetta tíð. Sambært Manntali 2011 arbeiða 54% av kvinnunum í Føroyum undir 35 tímar um vikuna, og tað er eisini flest í Norðurlondum.

Ein týðandi orsøk til, at kvinnur arbeiða niðursetta tíð, er fyri at fáa familjulívið at ganga smidligari, sigur Erika Hayfield, sum saman við øðrum hevur kannað parttíðararbeiðið í Føroyum, Grønlandi og Álandi.[24] Kvinnur fata seg sjálvar sum tann støðuga partin av familjuni, sum fær gerandisdagin at glíða smidligari, og sum eisini ger, at maðurin kann vera meira mobilur á arbeiðsmarknaðinum.

Søguliga er føroyski arbeiðsmarknaðurin merktur av, at nógvir menn eru sjómenn ella arbeiða uttanlands. Ráðandi fatanin var – og er kanska í stóran mun enn – at menn máttu hava arbeiði. Óbeinleiðis raðfesta vit, sum samfelag, arbeiðið hjá monnum hægri enn arbeiðið hjá kvinnum.

„Vit taka altíð avgerðir innan fyri givnar strukturar. Okkara kynmentan skapar rættiliga strammar karmar fyri, hvørjar avgerðir vit kunnu taka sum kvinnur og menn. Har eru ymiskar væntanir til, hvat kvinnur og menn kunnu gera. Tað eru væntanir til menn, at teir eru á arbeiðsmarknaðinum, og at kvinnurnar eru tær góðu, ordiligu mammurnar, sum taka sær meira av heiminum," sigur Erika Hayfield, granskari.[25]

Tí er tað umráðandi, at arbeitt verður við at mýkja ráðandi kynmentanina, um vit skulu fáa betri javnstøðu í Føroyum. Fleiri familjur velja, at kvinnurnar arbeiða niðursetta tíð, meðan børnini eru smá. Men kvinnur eru ikki bundnar av smábørnum alt lívið.

Og tað er umráðandi at hava í huga, at tað ikki altíð er av egnum vilja, at kvinnur arbeiða niðursetta tíð. Fimta hvør, 20%, av kvinnunum, sum arbeiða niðursetta tíð, kundu sambært Manntali 2011 hugsað sær fleiri tímar. Ein stórur partur av størvunum, har stór yvirvág er av kvinnum, verður normeraður sum parttíðarstørv, og hetta hevur víst seg at vera trupult at broyta.[26]

Føroyar eru eitt útjaðara- og oyggjasamfelag, og arbeiðsmarknaðurin er øðrvísi enn í okkara grannalondum. Vit eiga tí at gera okkara egnu skipanir, sum taka atlit at, at vit hava nógv sjófólk, samstundis sum kynini kunnu hava javnbjóðis møguleikar at virka og býta uppgávurnar heima sínámillum.[27]

Tað er sostatt bæði tørvur á at økja um tilvitanina um støðuna, at betra um møguleikarnar at arbeiða fulla tíð hjá kvinnum, sum ynskja tað, og at gera skipanir sum taka hædd fyri serliga arbeiðsmarknaðinum í Føroyum.

### › Átak 11: Kunning um parttíðarstørv í Føroyum

Átak 11 snýr seg um at leggja fram norðurlendsku kanningina um parttíðarstørv í Føroyum, Grønlandi og Álandi, og fáa viðkomandi partar á arbeiðsmarknaðinum at kjakast um støðuna, sum hon er, og hvat eigur at verða gjørt.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2018** |
| Ábyrgdari | **Javnstøðunevndin** |

### › Átak 12: Økja møguleikan fyri at arbeiða fulla tíð

Átak 12 snýr seg um at gera verkætlan við avvarðandi pørtum, sum varða av økjum, har talið av normeraðum parttíðarstørvum er serliga stórt. Verkætlanin skal kanna møguleikar at gera broytingar í vaktarskipanum, soleiðis at møguleiki verður hjá teimum kvinnum, sum í dag arbeiða niðursetta tíð at arbeiða fulla tíð.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2018-2020** |
| Ábyrgdari | **Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum** |
| Samstarvspartnari | **Heilsuverkið, Kommunufelagið, fakfeløg** |

## Minka munin á pensjónsuppsparing millum kynini

Kanningar vísa, at kvinnur hava munandi minni í pensjónsuppsparing enn menn. Verður hugt at uppsparingunum hjá LÍV (2010) er áhugavert at vísa á niðanfyri standandi tøl:

- Menn í aldrinum **60-64 ár** hava **67%** hægri uppspart virði enn kvinnur (talan er um miðalvirði). Í hesum aldursbólkinum høvdu menn í miðal **kr. 311.084** og kvinnur **kr. 187.807.**
- Menn í aldrinum **65-69 ár** hava **26%** hægri uppspart virði enn kvinnur. Í hesum aldursbólkinum høvdu menn í miðal **kr. 241.753** og kvinnur **kr. 179.955**.

23 *Kvinna, nr. 02/2017*

24 *Part-Time Work in the Nordic Region III, TemaNord 2016:518*

25 *Kvinna nr. 02/2017*

26 *Frá heimasíðuni hjá Javnstøðunevndini*

27 *Hayfield, E. í Kvinnu nr. 02/2017*





Tað eru fleiri orsøkir til hetta. Kvinnur forvinna minni enn menn, og tá pensjónsuppsparingin ofta er ein prosentupphædd av lønini, verður uppsparingin eisini minni. Kvinnur eru í størri mun enn menn í lág- og miðallønarstørvum, og ein stórur partur arbeiðir niðursetta tíð. Men afturat hesum eiga flestu kvinnur nøkur børn í sínum lívsskeiði, og fara í hesum sambandi av arbeiðsmarknaðinum, í barnsburðarfarloyvi í eitt longri tíðarskeið.

Til 2014 hava tær kvinnur, sum fingu gjald úr Barsilsskipanini, ikki fingið eftirlønargjald. Eftir 2014 verður tvungna eftirlønin trekt frá barsilsgjaldinum.

Við pensjónsnýskipanini er ætlanin at tvungna eftirlønin verður løgd omaná barsilsgjaldið, og tað verður ein bati. Men tá útgjaldið úr barsilsskipanini kann vera lægri enn lønin, og tvungna eftirlønin ofta er munandi lægri enn eftirlønin, sum fleiri hava avtalað við arbeiðsgevara, merkir hetta eisini minni inngjald í eftirløn.

Av hesi orsøk hava kvinnur í sínum arbeiðslívi ofta fleiri tíðarskeið, har tær spara lítið ella onki upp til eftirløn, og hetta hevur neiliga ávirkan á pensjónsuppsparingina.

### › Átak 13: Kanning av muninum millum pensjónsuppsparing hjá kvinnum og monnum

Átak 13 er at gera eina neyvari kanning av støðuni í Føroyum, fáa til vega tøl, til tess at fáa størri vitan um hetta týðandi evnið.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2018-2020** |
| Ábyrgdari | **Almannamálaráðið** |
| Samstarvspartnari | **Granskingarráðið, Pensjónsfeløg, fakfeløg** |

### › Átak 14: Kunningartiltak – javnstøða viðvíkjandi pensjónsviðurskiftum

Átak 14 snýr seg um at gera kunningarátøk, sum upplýsa fólk um ójavnan millum kvinnur og menn, tá tað snýr seg um pensjónsuppsparingar, og hvørjir møguleikar eru fyri at rætta upp upp á hetta. Eitt nú kunnu hjún og pør gera avtalur sínámillum, soleiðis at goldið verður inn á pensjónsuppsparingini hjá tí partinum, sum fær minni í løn, eitt nú vegna niðursetta arbeiðstíð ella farloyvi, til tess at minka um munin á uppsparingini millum kynini.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2020** |
| Ábyrgdari | **Almannamálaráðið** |

## Útlendskar kvinnur í Føroyum

Seinnu árini er talið av útlendingum, serliga úr fjarskotnum londum, sum hava búsett seg í Føroyum, nógv økt, og kvinnurnar eru greitt í yvirvág. Í Føroyum búgva umleið 1.100 innflytarar, sum koma úr øðrum londum enn Norðurlondum.



Meðan menn av útlendskum uppruna ofta flyta til Føroya við arbeiðsloyvi, flyta útlendskar kvinnur ofta til Føroya við familjusamanføring. Umstøðurnar hjá útlendskum kvinnum og útlendskum monnum eru tí ógvuliga ymiskar.

Útlendingastovan hevur víst á, at atgongdin til arbeiðsmarknaðin er av sera stórum týdningi, men hetta kann vera ein avbjóðing hjá útlendsku kvinnunum. Eitt nú kann talan vera um málsligar forðingar, tí tær ikki duga nóg væl føroyskt, eins og tað kann vera ein forðing, at tær ikki duga nógv væl danskt.

CEDAW-nevndin[28] hevur víst á, at neyðugt er at savna inn hagtøl og at greina støðuna hjá kvinnum frá minnilutabólkum, eitt nú støðuna í mun til arbeiðsmarknaðin, útbúgving o.a.

### Átak 15: Kanna støðuna hjá útlendskum kvinnum og gera neyðug átøk

Átak 15 snýr seg um at kanna støðuna hjá útlendskum kvinnum í Føroyum, og seta neyðug átøk í verk, saman við viðkomandi pørtum, til tess at kvinnurnar kunnu gerast virknar í føroyska samfelagnum.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2018-2022** |
| Ábyrgdari | **Almannamálaráðið** |
| Samstarvspartnari | **Útlendingastovan** |

### Javnstøðupolitikkur á arbeiðsplássum

Javnstøðan millum kvinnur og menn kann gerast betri, tá tað snýr seg um kynbýtið í leiðslum og í nevndarsessum (serliga tá talan er um formann ella forkvinnu). Kanningar vísa, at tær fyritøkur sum hava kvinnur í leiðslu ella forfólk í nevndum hava betri úrslit, enn fyritøkur, har bert menn eru í leiðslum.[29]

Sambært § 8 í javnstøðulógini skal kynbýtið í almennum nevndum, ráðum og líknandi vera javnt, og tað er skylda hjá Javnstøðunevndini at fylgja við gongdini á hesum øki. Gongdin seinastu 16 árini vísir, at tað hevur verið framgongd; í 2000 sótu menn í 70% av sessunum, og í 2016 eiga teir 61%. Hóast gongdin er jalig, er enn nakað eftir á mál, serliga á summum økjum, har meirilutin av monnum enn er 74%.

*28 CEDAW-nevndin er nevnd hjá ST. CEDAW stendur fyri „Convention of the Elimination of All Forms of Discrimination against Women"*

*29 Volvo Group framløga, Barbershop í Keypmannahavn, 12. oktober 2017*



Eitt er tó almennar nevndir, annað er leiðslur og nevndir í privata geiranum. Kynbýtið av nevndarsessum í privata vinnulívinum var í 2007 ávikavist 80% menn og 20% kvinnur. Tó vóru bara 14% av forfólkunum í nevndunum kvinnur.[30] Tá hugt verður eftir stjórastørvum í privata vinnulívinum vóru 80% av øllum stjórum menn. Í Manntal kanningini, sum varð gjørd í 2011, vóru 75%, sum søgdu seg vera leiðarar á arbeiðsplássum, menn.[31]

Mett verður ikki, at tað er rætt at áleggja privatum fyritøkum krøv um javnstøðu í nevndum og leiðslum. Tó er áhugavert at kanna og upplýsa um fyrimunirnar við javnstøðu eins og at eggja til eina størri javnstøðu, eisini í privata geiranum.

Stórar altjóða fyritøkur hava við góðum úrslitinum orðað javnstøðupolitikk fyri teirra arbeiðspláss, eitt nú Volvo og IKEA. Javnstøðupolitikkurin snýr seg um at seta sær mál um at fáa javnstøðu millum kynini á øllum stigum í fyritøkuni, tí fyritøkan fær betri fíggjarlig úrslit og starvsfólk trívast betur.

Mál eru sett sum t.d. at burturbeina lønarmun millum kynini, at hugsa javnstøðu, tá fólk verða sett í starv, gera arbeiðsplássið attraktivt til tess at fasthalda starvsfólk. Allir leiðarar og stjórar fáa harafturat undirvísing í javnstøðu.

### Átak 16: Javnstøðupolitikkur á arbeiðsplássum

Átak 16 snýr seg um at heita á nakrar føroyskar fyritøkur, sum hava ein stóran meiriluta av øðrum kyninum, at orða ein javnstøðupolitikk, og at virka fyri at fremja størri javnstøðu.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2018-2020** |
| Ábyrgdari | **Almannamálaráðið** |
| Samstarvspartnari | **Javnstøðunevndin og Føroya Arbeiðsgevarafelag** |

*30 Vinnuvitan 1. mars 2007*

*31 Vinnuvitan 8. oktober 2014*

## Fokusøki 3:

# Menn og javnstøða

Javnstøða snýr seg um javnstøðu millum kvinnur og menn. Men hóast javnstøðupolitikkur serliga hevur snúð seg um viðurskifti, har kvinnur eru fyri ójavnstøðu, eru eisini viðurskifti, har menn eru fyri ójavnstøðu vegna sítt kyn. Tað er av stórum týdningi, at javnstøðupolitikkur eisini viðgerð evnir, har dreingir og menn eru fyri ójavnstøðu vegna sítt kyn. At virka fyri at beina burtur órætt vegna kyn gagnar bæði kvinnum og monnum og gagnar øllum samfelagnum.

Tí eru menn og javnstøða eitt serstakt fokusøki. Sjóneykan verður í hesum fokusøkinum sett á pápar og barsilsfarloyvi, rættin hjá pápum at vera saman við børnum sínum og menn og heilsa. Undir fokusøki 2, javnstøða í arbeiðslívinum, varð eisini nomið við avbjóðingina í mun til dreingir og útbúgving.

### Pápar í barnsburðarfarloyvi

Barnsburður og barsil eru týðandi samfelagsøki, sum viðkoma øllum samfelagsborgarum. Tað er umráðandi at skapa so góð kor fyri barnafamiljur, sum yvirhøvur gjørligt. Barsilsskipanin í Føroyum er nógv ment seinnu árini, og sum heild má sigast, at hon er góð. Men rúm er fyri batum. Eitt nú eigur barsilsskipanin at vera meira smidlig, og skipanin eigur í størri mun at eggja pápum at taka barsilsfarloyvi.

Barsilsskipanin gevur foreldrum rætt til farloyvi í eitt ár eftir barnsburð. Mamman hevur rætt til 4 vikur undan barnsburði, og fyrstu 14 vikurnar eftir barnsburð eru markaðar til mammuna. 4 vikur eru markaðar til pápan. Eftir 14. viku kunnu foreldrini býta 28 vikur sínámillum. Loft er sett á útgjaldið, soleiðis at tað loysir seg betur at lata tað foreldrið, sum hevur lægri løn, taka farloyvið.

Støðan í Føroyum er hon, at mammurnar taka 93% av barnsburðarfarloyvinum, meðan pápar taka 7%.[32] Fleiri av hinum Norðurlondunum hava skipanir, har t.d. størri partur av barsilstíðini er markaður til pápan.[33]

Niðanfyri er mynd av, hvussu stóran part av barnsburðarfarloyvinum, pápar taka í teimum ymsu Norðurlondunum.

Kanningar vísa, at jú longri tíð kvinnurnar eru burturi frá arbeiðsmarknaðinum, tess størri verður lønargjógvin millum kynini.[34] Kanning vísir, at fyri hvønn mánað, sum pápin er í barnsburðarfarloyvi hækkar framtíðar lønin hjá mammuni við nærum 7%.[35]

At pápar fara í barsilsfarloyvi gagnar tó ikki bara lønarlagnum hjá kvinnunum, og tí fíggjarstøðuni hjá familjuni, men gagnar eisini pápum og børnum teirra. Royndir úr eitt nú Íslandi og Danmark vísa, at øll familjan trívist betur, tá páparnir eisini fáa møguleika at vera heima hjá børnunum.[36]

Pápar, sum hava verið í barnsburðarfarloyvi, fáa eitt tættari samband við barnið, og pápar hava stóran týdning í mun til kensluligu og andligu menningina hjá barninum, eins og menningina av innlivingarevnum barnsins.[37]

At pápar eru saman við sínum børnum tíðliga í lívinum, mótvirkar vánaligari sálarheilsu hjá børnunum, og hevur jaliga ávirkan á teirra sjálvvirði, og tey klára seg betur seinni í lívinum. Harafturat fremur umsorganin hjá monnum størri javnstøðu, tí, at umsorganin hjá monnunum fremur størri javnstøðu, tí børn, sum síggja pápar sínar taka lut í dagligu umsorganini, hava minni lyndi at halda seg til siðbundnu kynmynstrini; gentur velja í minni mun siðbundin størv, og dreingir, tá teir verða menn, hava størri sannlíkindi at gera húsligt arbeiði.[38]

Partur, sum pápar taka av barnsburðarfarloyvinum í %, 2016[34]




Kanningar vísa, at tey londini, sum marka ávísar vikur til pápar, hava best úrslit í mun til, at pápar fara í barsilsfarloyvi.

Ein kanning, sum Gallup gjørdi fyri Javnstøðunevndina í 2013 vísir, at stórur meiriluti av báðum kynum hevði tikið av, um pápin hevði fingið boðið 3 mánaðar barnsburðarfarloyvi markaðar til sín. Men av teimum, sum ikki høvdu tikið av, grundgeva nógv fleiri kvinnur enn menn við, at tað ber ikki til í arbeiðinum hjá manninum.

Fyrrverandi forkvinnan í Javnstøðunevndini, Katrin Kallsberg skrivar soleiðis í fororðinum til ársfrágreiðingina hjá nevndini í 2013:

„Tað er tankavekjandi, at menninir sjálvir halda tað bera til, meðan kvinnurnar síggja arbeiðið hjá manninum sum eina forðing. Hvørji størv eru soleiðis háttað, at ikki ber starvsfólkinum til at fara í barsil nakrar vikur fyri hvørt barnið í eitt heilt arbeiðslív?"

Víðari stendur: „Tað snýr seg í stóran mun um hugburð. Javnstøðunevndin heldur, at vit í Føroyum eiga at arbeiða fram móti eini betri barsilsskipan við størri parti av tíðini markaðum til pápan, tó uttan at mamman missir nakað. Hagtøl úr grannalondunum vísa, at páparnir taka tann partin av barsilstíðini, ið er markað til teir. Royndir úr grannalondunum vísa eisini, at tá pápin hevur virknan leiklut í primeru umsorganini av barninum, eru avleiðingar betri trivnaður fyri alla familjuna."[39]

Javnstøðunevndin mælir í ársfrágreiðingini frá 2016 til at endurskoða barsilsskipanina, soleiðis at hon verður javnari nýtt av báðum kynum. Mælt verður til, at útgjaldsloftið verður hægri, og hvørt foreldrið sjálvt ger av, hvussu nógvar vikur tað tekur – uttan at tað ávirkar hitt foreldrið. Og at í minsta lagi áttu kvoturnar hjá mammum og pápum at verið eins stórar.[40]

Mett verður, at til ber at arbeiða á fleiri økjum fyri at eggja pápum at fara í barsilsfarloyvi. Eitt nú eiga allar vikur, sum verða lagdar afturat barnsburðarfarloyvinum frameftir at verða markaðar pápunum. Eitt annað er at gera barsilsskipanina meira smidliga, soleiðis at foreldur í størri mun sjálvi kunnu avgera, nær tey fara í barsil. Og í triðja lagi kunnu upplýsingarátøk gerast, sum birta hugin ella gera tað meira góðtikið hjá pápum at fara í barsilsfarloyvi.

### ❯ Átak 17: Pápar longri í barsilsfarloyvi

Átak 17 snýr seg um at viðkomandi partar saman gera átøk, sum kunnu eggja fleiri pápum at taka barsilsfarloyvi.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2018-2022** |
| Ábyrgdari | **Samferðslumálaráðið** |
| Samstarvspartnari | **Lønardeildin, Føroya Arbeiðsgevarafelag, fakfeløg** |

*32 Ársfrágreiðing 2016, Javnstøðunevndin*
*33 Ársfrágreiðing 2013, Javnstøðunevndin*
*34 Social protection in the Nordic Countries, 2015/2016*
*35 The motherhood pay gap: A review of the issues, theory and international evidence, Working Paper No. 1/2015, International Labour Office (ILO)*
*36 Johansson, E-A., Effekten av delad föräldraledighet på kvinnors löner, 2010*
*37 Madsen, L.P. "Hele familjen trives bedre, når far er på banen", Kvinfo 1. sept. 2017*

*38 MenCare, A global fatherhood campaig, The MenCare Parental Leave Platform, 2016*
*39 MenCare, A global fatherhood campaig, The MenCare Parental Leave Platform, 2016*
*40 Sí meira um kanningina í Fylgiskjalið 2*

## Rætturin hjá pápum at taka størri lut í lívinum hjá smábørnum

Børn hava rætt til bæði foreldur. Samgongan hevur sett sær fyri at styrkja rættindini hjá børnunum til bæði foreldur. Tá børn eru fødd uttanfyri hjúnalag, sum meira enn helmingurin av børnunum er, fær mamman einsamøll foreldramyndugleikan yvir barninum, um foreldrini ikki hava gjørt avtalu um felags foreldramyndugleika. Fara foreldur hvørt til sítt, búgva børnini aloftast hjá mammuni. Hetta kann ávirka sambandið millum pápa og barn.

Familjurætturin er danskt málsøki, men avtala er gjørd um at yvirtaka málsøkið 29. juli 2018. Eftir at málsøkið er yvirtikið, skal kannast, hvussu lóggávan skal vera á økinum í Føroyum, og hvussu vit við lóggávuni kunnu styrkja rættindini hjá børnunum til bæði foreldur.

### › Átak 18: Betri foreldrarættindi

Átak 18 snýr seg um at kanna, hvussu lóggávan skal vera á økinum í Føroyum, og hvussu vit við lóggávuni kunnu styrkja rættindini hjá børnunum til bæði foreldur.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **Eftir 29. juli 2018** |
| Ábyrgdari | **Heilsu- og innlendismálaráðið** |

## Menn og heilsa

Menn liva í meðal 5 ár styttri enn kvinnur. Menn fáa eisini í størri mun álvarsamar sjúkur enn kvinnur. Sambært danskari kanning brúka menn millum 40 og 65 ár sín lækna helvtina so lítið, sum kvinnur. Teir fara seint til lækna, og eru ofta sjúkari, tá teir loksins fara til lækna. Tað er ein viðvirkandi orsøk til, at menn doyggja 40% oftari av krabba, enn kvinnur. Og hvørja ferð 100 kvinnur doyggja av hjarta/æðrasjúkum, doyggja 146 menn.[41] Hetta vísa danskar kanningar, og tøl frá landslæknanum vísa, at støðan er ikki øðrvísi í Føroyum.[42]

*41 www.sundmand.dk*
*42 Heilsulýsing Landslæknans 2015-2016*



Í Danmark eru átøk gjørd, sum serliga venda sær til menn, fyri at fáa teir at gáa eftir broytingum í kroppinum og almenna trivnaðinum, og eggja teimum at fara til lækna. Eisini eru átøk gjørd mótvegis heilsuskipanini, sum í fleiri førum ikki hevur nøktandi amboð at síggja sjúkueyðkenni hjá monnum. Føroyskir sjómenn hava tó tann fyrimun, at teir skulu regluliga til lækna fyri at fáa Bláu bók, og tí kanska eru oftari í sambandi við heilsuverkið enn menn í okkara grannalondum. Kanningar vísa tó, at menn eru í størri vanda at vera fyri álvarsligum arbeiðsvanlukkum, eisini á sjónum.

Tað eru serliga menn, sum eru illa fyri fíggjarliga, sum eru í størsta heilsuvanda. Teir hava lægsta miðallivialdur, eru ringast fyri og eru í størst vanda fyri at gerast bundnir at rúsdrekka og/ella rúsevnum, og gerast heimleysir. Eisini eru teir í størri vanda fyri at fremja sjálvmorð.

### › Átak 19: Kunningarátøk – Hvat feilar tær, maður?

Átak 19 snýr seg um at gera eitt átak serliga ætlað monnum í mun til heilsu.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2019-2021** |
| Ábyrgdari | **Fólkaheilsuráðið** |

## Barbershop

Fyri at fáa menn at samskifta um javnstøðu og at vekja áhugan hjá monnum um javnstøðuspurningar, hevur Norðurlendska ráðharraráðið skipað fyri einari røð av sokallaðum Barbershops við góðum úrslitum.

Endamálið við Barbershop'unum er at skipa eitt stað at umrøða javnstøðumál, har menn kenna seg aftur – eitt nú hjá hárskera, í skiftingarrúminum ella í undirhúsinum. Hesi Barbershops hava verið á ST høvuðsborgini í New York, á høvuðsborg NATO's í Brússel, og hjá WTO, ILO og ST í Geneve. Nú er ætlanin at skipa fyri einari Barbershop Føroyum.

Á Barbershopini fara menn frá týðandi vinnufyritøkum, sum hava royndir at fáa størri javnstøðu millum kynini á virkjum sínum, at greiða frá royndum og geva øðrum vinnulívsleiðarum íblástur.

### › Átak 20: Barbershop

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **Á heysti 2019** |
| Ábyrgdari | **Almannamálaráðið** |
| Samstarvspartnari | **Javnstøðunevndin, íslendska Uttanríkismálaráðið og Vælferðarmálaráðið, Fólkaheilsuráðið** |

Fokusøki 4:

# Harðskapur og haturstala

Harðskapur móti kvinnum er eitt alheims fyribrigdi. Í patriarkalskum samfeløgum hevur kvinnan í øldir verið undirløgd manninum og kropsliga eru kvinnur veikari enn menn.

Gjøgnum alla tjúgundu øld hava kvinnur stríðst fyri sínum rættindum og javnstøðu, tað veri seg á sosiala økinum, í politikki, eins og fíggjarliga. Hetta stríð hevur havt við sær, at nógv lond hava samtykt lógir, sum skulu tryggja kvinnum síni rættindi, sí eisini okkara javnstøðulóg.[43]

Harðskapur móti kvinnum og gentum er eitt sera álvarsligt brot á kvinnurættindi. Í CEDAW-sáttmálanum hjá ST (sí um sáttmálan á s. 36 ), er orðið harðskapur ikki beinleiðis nevnt. Men í 1992 gjørdi CEDAW-nevndin eitt tilmæli, sum snúði seg um harðskap móti kvinnum. Í tilmælinum skrivar nevndin, at kyngrundaður harðskapur er eitt slag av mismuni, sum álvarsliga forðar kvinnum í at hava rættindi og frælsi á jøvnum føti við menn.

Harðskapur, antin hann er sálarligur ella kropsligur, ger seg inn á rættin hjá einstaklinginum til at ráða yvir egnum lívi. Og børn, sum eru vitni til harðskap, bera henda førning við sær víðari í lívinum.

Altjóða samfelagið hevur avgjørt, at harðskapur móti kvinnum og gentum skal steðga, og ST hevur bundið seg til at berjast móti harðskapi móti kvinnum.[44] CEDAW-nevndin hevur víst á viðurskifti í Føroyum, sum ikki eru í lagi, eisini tá talan er um harðskap móti kvinnum, sí talvu í fylgiskjali 1.

Arbeiðið at seta í verk átøkini í Heildarætlan um harðskap í parløgum og nærsambondum byrjaði í 2012. Enn vita vit ikki heilt, hvussu øll átøkini hava hilnast, men vit vita, at opinleikin í samfelagnum er vorðin størri og at fólk tora betur at leita sær hjálp, tá um harðskap ræður – bæði tey, sum eru fyri harðskapi og tey, sum hava framt harðskap.

Vit eiga alla tíðina at gera upplýsandi átøk, sum kunna um fylgjurnar av harðskapi og um, hvar kvinnur, sum eru fyri harðskapi, kunnu leita sær

43 *Løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn*

44 *http://www.un.org/womenwatch/daw/vaw/index.htm*



hjálp. Í arbeiðinum við Heildarætlan um harðskap í parløgum og nærsambondum eins og Heildarætlan um kynsligan ágang hevur samstarvið við viðkomandi samstarvspartar og starvsbólkar verið fyrimyndarligt. Hetta samstarvið er sera týdningarmikið í arbeiðinum at basa harðskapi móti kvinnum.

## Haturstala

Norðurlendska ráðharraráðið fyri javnstøðu hevur samtykt, at arbeiðið at basa haturstalu (hate speech) er eitt fokusøki í norðurlendska javnstøðusamstarvinum tíðarskeiðið 2015-2018.

Allýsingin av haturstalu er: „Haturstala er tala, ið loypir á ein persón ella ein bólk vegna teirra húðalit, átrúnað, uppruna, kynsligan samleika, brek ella kyn."

Í juni í 2017 skipaði Noreg, sum hevði formansskapin, fyri stórari altjóða ráðstevnu um hetta evnið.[45] Endamálið við ráðstevnuni var at kunna um evnið og at leggja fram royndir við arbeiðinum at basa haturstalu. Norðurlendskir og altjóða serfrøðingar tóku lut á ráðstevnuni, har dentur serliga varð lagdur á ungdómsperspektivið í mun til haturstalu.

Eisini á norðurlendska ráðharrafundinum í Lofoten í 2017, var evnið á breddanum, og allir ráðharrarnir samdust um, at Norðurlond eiga at fremja felags átøk móti haturstalu.

„Tora fólk ikki at siga hugsan sína alment, er talan í grundini um, at talufrælsið verður skert," segði Eyðgunn Samuelsen, landsstýriskvinna, sum tók lut á fundinum.

Eisini í Føroyum er trupulleikin kendur, og landsstýriskvinnan heldur tað vera sera týdningarmikið, at vit røkka teimum ungu við boðskapinum um, at vit vilja basa haturstalu.

45 *https://www.norden.org/en/nordic-council-of-ministers/council-of-ministers/the-nordic-council-of-ministers-for-gender-equality-mr-jaem/nordic-committee-of-senior-officials-for-gender-equality-ek-jaem/events/nordic-conference-on-hate-speech*

Í samstarvi við Fólkaheilsuráðið, Amnesty International og Politiið í Føroyum hevur Almannamálaráðið í tvey ár, 2016 og 2017, gjørt fyribyrgjandi kampanjur. Tann fyrra undir yvirskriftini „Sex krevur samtykki“, og tann seinna undir yvirskriftini „Mynd krevur samtykki“. Tann seinna snúði seg um tað at býta myndir á netinum.[46] Kampanjurnar í 2016 og 2017 vórðu væl móttiknar, ikki minst av teimum ungu, og tað hevur alstóran týdning at røkka júst ungdóminum við boðskapinum um haturstalu.

### Átak 21: Kunningarátak – Haturstala

Átak 21 snýr seg um at gera kampanju um haturstalu við at framleiða tilfar, sum serliga vendir sær til ung, har sum ung ferðast, eitt nú á netinum.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2018-2020** |
| Ábyrgdari | **Sig frá** |
| Samstarvspartnari | **Fólkaheilsuráðið** |

### Hagtøl um harðskap móti kvinnum

Sambært ST er ella hevur triðja hvør kvinna í øllum heiminum verið fyri harðskapi, flestu teirra frá makanum.[47] Hvussu støðan er her hjá okkum, vita vit ikki við vissu, og neyðugt er útvega nøktandi hagtøl, sum eisini skulu brúkast í sambandi við komandi CEDAW hoyring, sum verður í 2019.

Tøl hjá Kvinnuhúsinum vísa, at í 2016 vóru 488 áheitanir til Kvinnuhúsið, og at 6 kvinnur og 5 børn gistu á Kreppumiðstøðini.[48]

### Átak 22: Útvega hagtøl um harðskap móti kvinnum

Átak 22 snýr seg um at útvega nøktandi hagtøl um harðskap móti kvinnum, sum CEDAW-nevndin eisini hevur víst á mangla.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2018-2019** |
| Ábyrgdari | **Sig frá** |

*46 https://www.amnesty.fo/tidindi/mynd-krevur-samtykki/*
*47 http://www.unwomen.org/-/media/headquarters/attachments/sections/library/publications/2013/12/un%20women%20evaw-thembrief_us-web-rev9%20pdf.pdf?la=en*
*48 sí ársfrágreiðing á heimasíðuni hjá Kvinnuhúsinum, kvinnuhusid.fo.*





Fokusøki 5:

# Lóggáva og altjóða sáttmáli

Hóast fáar løgfrøðiligar forðingar eru fyri javnstøðu í Føroyum, eigur javnstøðulóggávan at verða dagførd, soleiðis at hon virkar í dagsins samfelag.

Javnstøðulógin er frá 1994, og er lógin hesi nærum 25 árini ikki broytt. Mett verður, at tíðin er komin at gera ávísar broytingar, sum verða viðgjørdar niðanfyri.

Føroyar hava umframt javnstøðulógina tikið undir við altjóða sáttmála, sum hevur til endamáls at burturbeina allan mismun móti kvinnum, nevndur CEDAW-sáttmálin, ella Kvinnurættindasáttmálin.[49] Fjórða hvørt ár skulu Føroyar til hoyringar í ST í sambandi við, at CEDAW- nevndin ger niðurstøður um, hvørt Føroyar liva upp til ásetingarnar í sáttmálanum. Føroyar vóru seinast til hoyringar í ST í 2015 og fingu tá fleiri viðmerkingar. Hesar eiga at verða tiknar í álvara og arbeitt eigur at verða fyri at bøta tey viðurskifti, sum viðmerkingarnar snúgva seg um.

## CEDAW-sáttmálin

Hóast vit kunnu siga, at vit í Føroyum hava formliga javnstøðu millum menn og kvinnur, eru tað fleiri dømi um, at kvinnur eru fyri mismuni. Hetta sæst m.a. við at hyggja eftir Global Gender Gap Report, sum World Economic Forum stendur fyri. Kvinnuójavnstøðan í heiminum er mett at vera ein nóg víttfevnandi trupulleiki til, at ST hevur ein serligan menniskjarættindasáttmála fyri kvinnur, Convention on the Elimination of All Forms of Discrimination against Women, CEDAW-sáttmálin. 186 lond hava tikið undir við sáttmálanum.[50]

Løgtingið samtykti sáttmálan í 1987, og harvið bleiv sáttmálin rættarliga bindandi fyri Føroyar. Sáttmálin bindur limaríkini til at avtaka mismun á øllum økjum í samfelagnum.[51]

At Kvinnurættindasáttmálin er rættarliga bindandi fyri Føroyar, merkir, at myndugleikar og almennir stovnar hava skyldu til at lóggeva,

*49 CEDAW stendur fyri „Convention on the Elimination of All Forms of Discrimination against Women."*

*50 CEDAW skrivar m.a. á heimasíðu sínari: „By accepting the Convention, States commit themselves to undertake a series of measures to end discrimination against women in all forms, including:*

- *to incorporate the principle of equality of men and women in their legal system, abolish all discriminatory laws and adopt appropriate ones prohibiting discrimination against women;*
- *to establish tribunals and other public institutions to ensure the effective protection of women against discrimination; and*
- *to ensure elimination of all acts of discrimination against women by persons, organizations or enterprises."*

*51 Poulsen, K.W. (2009) „CEDAW: Menniskjarættindi fyri kvinnur". Greinasavn um ST og mannarættindi. Ritstj. Amnesty International Føroya Deild. Fróðskapur.*



fyrisita og annars virka samsvarandi sáttmálanum fyri at avtaka mismun móti kvinnum á øllum økjum í samfelagnum. Tílíkur mismunur fevnir um bæði formligar og óformligar forðingar.

Fjórða hvørt ár eru Føroyar til hoyringar í ST. Hoyringin fer fram í sambandi við, at CEDAW nevndin ger niðurstøður um, hvørt Føroyar liva upp til ásetingarnar í sáttmálanum. Føroyar vóru til hoyringar í 2015, og skulu aftur í 2019. Í niðurstøðuni hevur CEDAW-nevndin varpað ljós á nøkur viðurskifti, ið tey meta ikki eru í lagi í Føroyum, hvat javnstøðu viðvíkur. Hesi eru sett upp í talvu í fylgiskjali 1.

CEDAW-nevndin festi seg serliga við, at fáar kvinnur eru í leiðslum bæði á privata arbeiðsmarknaðinum og innan tað almenna. Harumframt mælti CEDAW-nevndin til, at kvinnur, sum arbeiða niðursetta tíð fáa møguleikan at arbeiða fulla tíð. Samanumtikið verður eisini mælt til, at Føroyar seta í verk tiltøk fyri at fremja veruliga, de facto, javnstøðu.

Føroyar skulu aftur til hoyringar um Kvinnurættinda-sáttmálan í 2019, og metir landsstýriskvinnan í javnstøðumálum, at millum annað við hesi virkisætlan ber til at bøta um fleiri av teimum viðmerkingum, sum ST hevði til Føroyar í 2015.

### › Átak 23: Almenn kunning um Kvinnurættindasáttmálan

Ein av viðmerkingunum hjá CEDAW-nevndini var, at Føroyar skulu upplýsa um Kvinnurættindasáttmálan, og hvat sáttmálin merkir fyri samfelagið. Hetta verður millum annað gjørt nú Javnstøðupolitikkurin og virkisætlanin fara til aðalorðaskiftis í løgtinginum.

Almannamálaráðið fer saman við Mentamálaráðnum og Amnesty International at gera ætlan til tess at tryggja, at CEDAW-sáttmálin verður betur kendur í Føroyum, eitt nú við at gera serstakt undirvísingartilfar um sáttmálan, umframt at gera sáttmálan meira kendan millum fólk.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2018-2019** |
| Ábyrgdari | **Almannamálaráðið** |
| Samstarvspartnari | **Mentamálaráðið og Amnesty International** |



## Javnstøðulógin

Løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn hevur til endamáls at beina burtur allan mismun vegna kyn, bæði tá tað snýr seg um útbúgving, arbeiði, yrkisliga og mentanarliga menning. Sambært lógini er Javnstøðunevndin sett at hava eftirlit við, at javnstøðulógin verður hildin, eins og at ráðgeva og gera tilmæli í spurningum, sum snúgva seg um javnstøðumál. Harumframt skal Javnstøðunevndin viðgera kærur frá fólki, sum halda seg hava verið fyri mismuni vegna sítt kyn. Javnstøðunevndin er eisini kærumyndugleiki í løgtingslóg nr. 63 frá 26. juni 2011 um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum, orsakað av breki.

Javnstøðunevndin hevur fimm limir, sum verða tilnevndir av landsstýrinum eftir tilmæli frá arbeiðstakarum, arbeiðsgevarum, Kvinnufelagssamskipan Føroya, eitt umboðandi skúla-, heilsu og almannaverkið og eitt umboðandi Føroya landsstýri. Umboð landsstýrisins er formaður ella forkvinna.

Skiftandi Javnstøðunevndir hava gjørt vart við, at javnstøðulógin eigur at verða endurskoðað.[52] Ein av høvuðsatfinningunum, sum Javnstøðunevndin hevur til lógina, er, at kærur um brot á javnstøðulógina verða viðgjørdar í nevndini, heldur enn av óheftum myndugleika. Hetta kann bæði vera óheppið, tá nevndin er samansett av fólkum við greiðum áhugamálum (t.d. umboð fyri arbeiðsgevarar og umboð fyri arbeiðstakarar), og tí kærumál taka nógva tíð hjá nevndini. Harafturat hevur ivi verið um heimildina hjá Javnstøðunevndini at áleggja pørtum at rinda endurgjald. Hildið verður, at Javnstøðunevndin heldur enn at brúka orku til at viðgera kærumál, átti at brúkt orkuna til at fremja javnstøðu við upplýsing og kunning í almenna rúminum.

### › Átak 24: Leggja kærumál hjá Javnstøðunevndini til kærunevnd

Átak 24 snýr seg um at gera uppskot til broyting í javnstøðulógini soleiðis, at kærumál verða løgd til sjálvstøðuga kærunevnd ella til Føroya kærustovn.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2018** |
| Ábyrgdari | **Almannamálaráðið** |

*52 Ársfrágreiðing 2007, Javnstøðunevndin*





## Skrivstova til javnstøðumál

Árliga játtanin til Javnstøðunevndina á fíggjarlógini hevur seinastu 10 árini meira ella minni staðið í stað, og er í 2017 419.000 kr. Fíggjarliga orkan er ikki til at fremja tær ætlanir, sum nevndin kundi hugsað sær. Afturvendandi forfólk í Javnstøðunevndini hava eisini í ársfrágreiðingum víst á, at umstøðurnar at fáast við javnstøðunevndararbeiði einamest eru í frítíðini,[53] og hetta er ikki nóg gott.

Uppgávurnar eru nógvar og tíðarkrevjandi, og skal nakað munagott fáast burtur, hevði verið betri at nevndin varð knýtt at eini skrivstovu. Skrivstovan kann hava til uppgávu at fyrireika mál til nevndina at taka støðu til, eins og at útinna tær ætlanir, sum nevndin setir út í kortið.

Skrivstovan kann samstundis í størri mun vera tøk hjá myndugleikum, stovnum, feløgum og einstaklingum at venda sær til at fáa hjálp og ráðgeving í javnstøðuspurningum. Ein skrivstova kann á ymsan hátt varpað ljós á javnstøðumál, og standa fyri átøkum sum fremja størri javnstøðu. Fyri at tryggja eitt ávíst fakligt umhvørvi, eigur at verða kannað um líknandi nevndir og ráð undir landsstýrinum kundu skipað seg saman í skrivstovu, eitt nú Demokratia, sum er í líknandi støðu sum Javnstøðunevndin.

### Átak 25: Seta á stovn skrivstovu at taka sær av m.ø. javnstøðumálum

Átak 25 snýr seg um at virka fyri at skipa ymsar almennar nevndir og ráð saman í eina skrivstovu, sum skal virka fyri at fremja málini hjá hesum nevndum og ráðum. Eitt nú skal skrivstovan virka fyri Javnstøðunevndina og Demokratia, og møguliga onnur við. Játtan eigur at vera til at framleiða tilfar til myndugleikar, skúlar, stovnar, feløg o.o.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2018-2019** |
| Ábyrgdari | **Almannamálaráðið** |

## Kynsamtáttan

Kynsamtáttan, á enskum Gender mainstreaming, er eitt altjóða viðurkent amboð at nýta til tess at røkka javnstøðu. At kynsamtátta merkir, at javnstøðuperspektivið er í miðdeplinum í øllum arbeiði í fyrisitingini, sum ávirkar menniskju.

Kynsamtáttan varð samtykt sum strategiamboð á altjóða kvinnuráðstevnuni í Beijing í 1995, og hevði sum høvuðsendamál at fáa londini at binda seg til javnstøðuarbeiðið, og at flyta javnstøðumál frá „útjaðaranum" í politikki, inn í politiska „maskinrúmið".

Javnstøða millum kvinnur og menn verður til, har vanligar avgerðir verða tiknar, har tilfeingi verður býtt, og har normar verða skaptir. Tí má javnstøðuperspektivið vera við í dagliga arbeiðinum í fyrisitingini. Í øllum lóggávuarbeiði, í øllum tilgongdum, har avgerðir verða tiknar eins og í allari ráðlegging eigur hædd at verða tikin at kyni og javnstøðu. Javnstøðuperspektivið skal vera við í orðingum av politikki, í gransking, í samskifti, í raðfestingum, íverksetan og eftirliti av skipanum og verkætlanum.

Kynsamtáttan er ein strategi til tess at røkka javnstøðu, men er ikki eitt mál í sjálvum sær. Heldur er talan um eitt amboð at røkka málinum um javnstøðu millum kynini.

### Átak 26: Kynsamtáttan

Átak 26 snýr seg um at fáa javnstøðuperspektivið inn í alt virksemið í fyrisitingini.

Løgmannskrivstovan og Javnstøðunevndin arbeiða saman um, hvussu hetta kann fremjast.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2018-2020** |
| Ábyrgdari | **Løgmansskrivstovan** |
| Samstarvspartnari | **Javnstøðunevndin** |

## Javnstøðufrágreiðing

Á javnstøðuøkinum hava vit – sum á fleiri øðrum økjum – ov vánaligt hagtalsgrundarlag og ov fáar kanningar, sum vísa støðuna á økinum. Tað hevur alstóran týdning at styrkja hetta økið. Ein gongd leið er at fáa fyritøkur og stovnar at gera afturvendandi javnstøðufrágreiðingar.

Í grannalondum okkara eru krøv til eitt nú stovnar og fyritøkur at gera slíkar frágreiðingar. Endamálið við frágreiðingunum er at geva eina mynd av, hvat hesi gera fyri at fremja javnstøðu, og hvussu tey hugsa kyn inn í teirra arbeiði og tilboð til borgarar. Í nøkrum londum eru tað einans lands- og kommunalir stovnar, sum gera hesar frágreiðingar, í øðrum londum ger stórur partur av arbeiðsmarknaðinum hesar frágreiðingar.

Tað er týdningarmikið, tá slíkar frágreiðingar skulu gerast, at tað ikki verður álagt stovnum og fyritøkum eyka umsiting. Miðað eigur at vera ímóti at brúka upplýsingar, sum longu eru til taks.

### Átak 27: Javnstøðufrágreiðing

Átak 27 snýr seg í fyrstu atløgu um at finna fram til, hvussu arbeitt eigur at verða við hesum, hvørji krøv eiga at verða sett fyritøkum og virkjum, landsstovnum og kommunum um at arbeiða við at tryggja javnstøðu, hvørjir faktorar eru viðkomandi at arbeiða við, og hvussu upplýsingar til frágreiðingina skulu latast. Almannamálaráðið, Javnstøðunevndin og Hagstovan fara at gera hetta forarbeiðið.

| | |
|---|---|
| Tíðarætlan | **2018-2020** |
| Ábyrgdari | **Almannamálaráðið** |
| Samstarvspartnari | **Javnstøðunevndin og Hagstovan** |

*53 Ársfrágreiðing hjá Javnstøðunevndini 2015, 2011*

# Fylgiskjal 1

## Viðmerkingar frá CEDAW 2015

Niðanfyri eru tær mest týðandi viðmerkingar frá CEDAW-nevndini til Føroyar frá hoyringini í 2015.

Til ber at fáa nærri at vita um CEDAW niðurstøðurnar í frágreiðingini „Concluding observations of the Commitee on the Elimination of Discrimination against Women: Denmark".[54]

54 http://undocs.org/cedaw/C/DNK/CO/8



| Viðmerkingar frá CEDAW | Útgreining av CEDAW viðmerkingum |
|---|---|
| Almennar viðmerkingar | ▪ Alt ov lítið tilfar (hagtøl o.a.) um støðuna hjá kvinnum í Føroyum<br>▪ Kunnast skal um niðurstøðurnar hjá CEDAW til fyrisiting, løgting og dómsvald |
| Sáttmálin og ríkisrættarliga støða Føroya | ▪ DK er sáttmálapartur, men løgtingið og landsstýrið hava ábyrgd fyri javnstøðu og at tryggja sáttmálarættindini<br>▪ Mælir til, at CEDAW sáttmálin verður beinleiðis skrivaður inn í lóggávu |
| Kunnleiki um CEDAW sáttmálan | ▪ Betri kunning skal vera um CEDAW, serliga í mun til rættarskipan, løgfrøði, politisku skipanina, á tingi, í fyrisiting, løgreglu – umframt borgarum sum heild |
| Serligar fyribils fyriskipanir | ▪ Savna inn og greina hagtøl, sum eru býtt á kyn, seta í verk ítøkilig átøk til tess at fremja veruliga javnstøðu (de facto), og mýkja siðbundnu kynleiklutirnar í familjuni og í samfelagnum |
| Politisk umboðan | ▪ Nevndin fegnast um, at fleiri kvinnur eru í politikki, men er enn stúrin um lágu kvinnuumboðanina í løgtinginum. Mæla til fyribilsskipanir, eitt nú kvotur ella átøk, sum eggja politisku flokkunum at hava eins nógvar kvinnur og menn á vallistum |
| Lóggáva | ▪ Nevndin mælir til, at vit umhugsa at arbeiða sáttmálan inn í lóggávu, og í minsta lagi samtykkja lóg um forboð ímóti at gera mun vegna kyn<br>▪ Mælir til, at vit gera eina føroyska ætlan fyri at kynsamtátta (gender mainstreaming) |
| Harðskapur móti kvinnum | ▪ Samtykkja lóggávu um at savna inn og greina hagtøl býtt á aldur, uppruna, tjóðskap og samband millum offur og tann, ið fremur harðskap<br>▪ Tryggja dygd og verju, við hesum eisini tilhald, til kvinnur, sum hava verið fyri harðskapi<br>▪ Samtykkja lóggávu, sum serliga verjir kvinnur móti sálarligum harðskapi |
| Arbeiðsmarknaður | ▪ Nevndin heftir seg við, at framvegis er lønarmunur millum kynini og at framvegis mangla hagtøl, sum regluliga og óheft samanbera data um kyn og løn<br>▪ Føroyskar kvinnur eru virknar á arbeiðsmarknaðinum, men fáar í leiðandi størvum<br>▪ Nógvar kvinnur arbeiða niðursetta arbeiðstíð, sum hevur neiliga ávirkan á starvsmøguleikar og pensjón<br>▪ Hava ein kynbýttan arbeiðsmarknað<br>▪ Mæla til ítøkilig átøk at gera arbeiðsmarknaðin minni kynbýttan og tryggja fleiri kvinnum møguleika fyri at arbeiða fulla tíð<br>▪ Mæla til, at vit gera greiðar vegleiðingar um somu løn fyri arbeiði, sum hevur sama virði |
| Útbúgving | ▪ Tryggja fjølbroytt úrval av akademiskum og yrkisútbúgvingum, og eggja gentum og dreingjum at velja ósiðbundnar útbúgvingar og vinnuvegir, eitt nú eggja gentum at velja vísind og tøkni og dreingjum at velja umsorgan<br>▪ Eggja fleiri kvinnum at velja akademisk størv, og við fyribils skipanum fáa fleiri kvinnuligar professarar |
| Hagtøl og greiningar | ▪ Menna eina kynindikator skipan |
| Kunning um niðurstøður og uppfylging | ▪ Føroyskir myndugleikar skulu kunna um niðurstøðurnar fyri almenninginum, embætisfólkum, tingfólkum, kvinnu- og mannarættindafelagsskapum til tess at greiða er um framdu átøkini |

Tað er greitt frá í omanfyri standandi talvu, at CEDAW-nevndin hevur viðmerkingar á mestsum øllum økjum.

Eitt øki, sum kanska er serliga týðandi at taka fram, eru manglandi hagtøl og kanningar í Føroyum. Um vit ikki veruliga vita, hvussu støðan er, er torført at vita, hvørjar broytingar eiga at verða framdar, og um átøkini, sum verða framd, gera mun.

# Fylgiskjal 2

**Kanning hjá Javnstøðunevndini um hugburðin til barsilsviðurskifti**

Í august 2013 gjørdi Gallup eina kanning fyri Javnstøðunevndina um hugburðin til barsilsviðurskifti, og í november 2014 varð aftur ein líknandi kanning gjørd.

Kanningin frá 2013 vísir, at páparnir fáa sera lítlan ágóða av barslinum. Tey flestu eru nøgd við hægsta gjaldið úr Barsilsskipanini, men vildu ynskt longri barsil, og tey flestu meina, at eftirlønargjaldið skal fylgja við í barsilstíðini. Nógv tann størsti parturin av monnunum - 72% - vóru 0-14 dagar heima við hús við síðsta barninum. 62% av kvinnunum vóru 9 mánaðir ella longur heima við síðsta barninum.

Tey flestu (51%) halda, at um barsilsskipanin skuldi verið broytt, eiga mamman og pápin sjálvi at kunna avgera, hvussu tey býta barsilstíðina ímillum sín, men tey flestu (63%) høvdu tikið av, um pápin hevði fingið tilboð um markað 3 mánaða barsil - og her svara kynini nøkulunda eins.

Av teimum, sum ikki høvdu tikið av, svara 41% sum grundgeving, at tað ikki ber til í starvinum hjá pápanum. Men tað er áhugavert, at her svara kynini als ikki eins. Heili 52% av kvinnunum, men bara 21% av monnunum siga, at tað ikki ber pápanum til at taka barsilsfarloyvi orsakað av starvinum hjá honum.

Afturímóti nevna 43% av pápunum, sum ikki høvdu tikið av 3 mánaða barsilsfarloyvi, at mamman dugir betur at ansa barninum, sum fremstu grundgeving. Tað halda bara 17% av mammunum, sum ikki ynskja 3 mánaða barsil til páparnar.

64% av kvinnunum og 41% av monnunum halda verandi barsilsfarloyvi (august 2013) vera ov stutt. Tey flestu halda, at eftirlønargjald eigur at verða goldið teimum, sum eru í barsli, men her eru kynini ikki heilt samd: 75% av kvinnunum og 62% av monnunum.

Tey flestu (74%) halda, at galdandi hægsta gjald, 25.000 kr./mðn., er passaligt, og her eru kynini samd, og eingin stórvegis munur er á inntøkubólkunum.

Kanningin frá november 2014 vísti so at siga sama úrslit sum í august 2013. (Kelda: Javnstøðunevndin)

# Keldulisti


- Arbejdsmiljø og Helbred i Danmark 2012-2020, Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø, 2014
- Ársfrágreiðingar frá Javnstøðunevndini 2007, 2011, 2013, 2015, 2016
- Ársfrágreiðing hjá Kvinnuhúsinum, 2016
- Et kønsopdelt arbejdsmarked. Udviklingstræk, konsekvenser og forklaringer. 16:15. SFI, Det nationale forskningscenter for velfærd, 2016.
- Exit Føroyar, Høgni Reistrup og Heri á Rógvi, 2012
- Framløga Volvo Group, 12. oktober 2017
- Fylgiskjal til samgonguskjalið: http://cdn.lms.fo/media/6803/fylgiskjal-mal-at-fremja-kvf.pdf
- Hamilton, L.C. og Otterstad, O. (1998). „Sex ratio and community size: Notes from the Northern Atlantic" Population and environment: A journal of interdisciplinary studies, 20 (1): 11-22.
- Heilsulýsing Landslæknans 2015-2016
- Heimasíðan hjá Amnesty International Føroya deild www.amnesty.fo
- Heimasíðan hjá Føroya landsstýri www.foroyalandsstyri.fo
- Heimasíðan hjá Hagstovuni www.hagstovan.fo
- Heimasíðan hjá Javnstøðunevndini www.javnstoda.fo
- Heimasíðan hjá Norðurlendskt samstarv www.norden.org
- Heimasíðan hjá Selskab for Mænds Sundhed www.sundmand.dk
- Heimasíðan hjá Starvsmannafelagnum www.starvsmannafelag.fo
- Heimasíður hjá ST www.un.org/womenwatch, www.unwomen.org, og www.undocs.org
- Hutters, C. og Brown, R. „Hvor bliver drengen af?", Centrer for ungdomsforskning, 2011
- Jacobsen, M. „Kynsleiklutir í føroyskum lesibókum 1.-3. flokk", Javnstøðunevndin 2010
- Johansson, E-A., Effekten av delad föräldraledighet på kvinnors löner, 2010
- Kvinna, nr. 02/2017
- Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011
- Løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn
- Løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 140 frá 18. desember 2015
- Madsen, L.P. „Hele familjen trives bedre, når far er på banen", Kvinfo 1. sept. 2017
- MenCare, A global fatherhood campaig, The MenCare Parental Leave Platform, 2016
- Námsfrøðilig stevnumið fyri dagstovnar, Mentamálaráðið, 2016
- Part-Time Work in the Nordic Region III, TemaNord 2016:518
- Poulsen, K.W. (2009) „CEDAW: Menniskjarættindi fyri kvinnur". Greinasavn um ST og mannarættindi. Ristj. Amnesty International Føroya Deild. Fróðskapur
- Puggaard, K.M og Bækgaard, L. „Håndbog om tiltræking af piger til Science, Technology, Engineering and Mathematics (STEM)", Norden, 2016
- Skúlablaðið nr. 2/2017
- Social protection in the Nordic Countries, 2015/2016
- Strøm, H.P. og Poulsen, K.W. „Javnstøða - Tvey Kyn" 2015
- The motherhood pay gap: A review of the issues, theory and international evidence, Working Paper No. 1/2015, International Labour Office (ILO)
- Vinnuvitan 1. mars 2007 og 8. oktober 2014
- Women and Men in the News, Nordic Council of Ministers, 2017